# Stórur áhugi fyri Summar Festivalinum

**FESTIVALUR** Roknað verður aftur í ár við sera nógv húsvognum, bátum og tjøldum á Summar Festivalinum.

Ongantíð áður hava so nógvir húsvognar verið savnaðir á einum staði sum á Summar Festivalinum í fjør. Meginparturin av føroysku húsvognunum var savnaður í Klaksvík, og líkt er til, at aftur í ár verður rættilig innrás av húsvognum í Klaksvík í sambandi við Summar Festivalin, siga fyrireikararnir.

Eisini koma nógvir bátar til Klaksvíkar á festivalinum, og kring vágna verður gjørt nógv burtur úr fyri at fáa pláss til teir mongu bátarnar.

Tey, sum vilja tryggja sær pláss til sín húsvogn ella bát, skulu seta seg í samband við Norðoya Kunningarstovu, sum umsitir plássini.

Tað er eisini populert at tjalda á Summar Festivalinum, og tað ber til at tjalda í tveimum ymiskum økjum. Eitt øki er sett av til familjur, og eitt annað øki er til tey ungu.

Summar Festivalurin verður hildin í døgunum frá 4. til 6. august.

# BankNordik bjóðar upp á Amagerbankan

**BÚSKAPUR** BankNordik hevur í dag latið inn eitt bindandi boð um at keypa partar av virkseminum hjá Amagerbanken, men talan er bert um sunnu partarnar av bankanum

Eirikur Lindenskov

Seljarin er Fíggjarligt Støðufesti, sum eftir yvirtøkuna av virkseminum í gamla Amagerbanken hevur skilt teir sunnu partarnar burtur úr og sett teir til sølu í eini skipaðari sølutilgond.

Áhugin hjá BankNordik fyri at taka yvir sunnu partarnar av Amagerbanken er í samsvari við strategi bankans um vøkstur, sum hevur verið leiðregla fyri sterku menning bankans seinnu árini. Strategiin byggir á eitt tætt samband við kundarnar, stramma stýring á kredittøkinum umframt at dentur verður lagdur á lønsemi í øllum virksemi. BankNordik keypti í fjør nìggju deildir frá Sparbank í Jyllandi og á Fyn umframt tríggjar deildir í Grønlandi.

– Vit vilja fegin víðka virksemið í Danmark enn meira. Fremst av øllum ígjøgnum natúrligan vøkstur, men vit hava eisini hildið eitt vakið eyga við møguleikanum fyri at yvirtaka áhugavert virksemi, sum hóskar til tann háttin, vit ynskja at reka banka. Eins og Amagerbanken leggja vit dent á góða kundatænastu og tøtt sambond við lokala marknaðin, sigur Janus Petersen, forstjóri í BankNordik.

Hendan møguliga íløgan hjá BankNordik verður lutvíst fíggjað við egnum pengi og lutvíst við at styrkja bankans longu frammanundan sterka kapitalgrundarlag. Bankin hevur samskift við útvaldar stovnsligar íleggjarar, sum stuðla undir íløguna og hava givið bindandi tilsøgn um at veita hybridkapital til ein mundandi part av fíggingini av keypinum.

– Við einum solvensprosenti á 17 við ársenda 2010 er BankNordik ein av sterkastu bankunum í Norðurlondum, og bankin hevur í eitt langt áramál víst gott lønsemi, vísir stjórin á.

Við atliti til sølutilgondina vil bankin ikki siga meira um støddina og treytirnar á boðnum

– Tí kann BankNordik, sum nú er, ikki greina fíggjarligu, handilsligu og fyriskipanarligu avleiðingarnar, sum kunnu væntast at standast av einum møguligum keypi. Fíggjarligt Støðufesti hevur ætlanir um eina skjóta viðgerð av innkomnu tilboðunum og avgerð um keypið, sigur Janus Petersen.

# Kveik.fo flytur til Vinnuhúsið

**KVINNUR** »Rætti maðurin er ofta ein kvinna!« Undir hesum slagorðinum lat kveik.fo upp 10. apríl í 2007. Nú er kveik.fo latin Vinnuhúsinum til ognar

Eirikur Lindenskov

Endamálið var, at Kveik skuldi gera tað lættari hjá teimum, sum taka avgerðir og útvega fólk, at fáa eyga á kvinnur við dyggum førleikum. Ein snarvegur at gera kvinnuliga tilfeingið í okkara samfelag sjónligt og lætt atkomandi.

– Tá varð áhaldandi sagt, at kvinnur ikki høvdu hug at bjóða seg fram, og at tað var orsøkin til, at so fáar kvinnur vóru í vinnulívinum, nevndum, álitisstørvum og so frameftir. Men sjálvar trúðu og trúgva vit framvegis, at ein orsøk til, at kvinnurnar eru sera fáar í eitt nú privatum nevndum er, at tær ikki eru eins lættar at fáa eyga á, tá leitað verður eftir fólki við røttu førleikunum.



– Tær kvinnur, sum valdu at skráseta seg á Kveik.fo valdu soleiðis at vísa sínar førleikar fram, og á henda hátt gera vart við, at tær eru har, og eru áhugaðar í at fáa tilboð um nevndarsessir, álitisstørv v.m., siga stigtakararnir.

Ætlanin við Kveik.fo var frá byrjan, at heimasíðan við tíðini skuldi mennast víðari til eina meira fjølbroytta heimasíðu/dátugrunn. Fyri at røkka hesum var tó neyðugt at fáa Kveik kjølfest hjá einum eigara, sum hevði áhugan, førleikarnar og motivasjónina at standa fyri víðari menningini. Leita hevur tí verið í eina tíð at finna røttu arvtakararnar til Kveik.fo.

– Valið er fallið á Vinnuhúsið og Føroya Arbeiðsgevarafelag, tí vit meta, at hetta er eitt felag, sum hevur førleika og orku at menna síðuna víðari. Harumframt hevur Vinnuhúsið játtað, at hóast síðan verður broytt, og mennirnir skjótt sleppa uppí part, so verður tað framvegis einfalt at finna skikkaðar kvinnur, og á tann hátt verður andin í upprunaliga Kveik varðveittur, siga stigtakararnir, sum í dag avhendaðu Kveik til Vinnuhúsið.

– Tað er altíð ein tørvur á vælskikkaðum kvinnum og monnum til álitisstørv í vinnuni. Tí hevur Vinnuhúsið átikið sær at veita hesa tænastuna og at røkja og menna heimasíðuna www.kveik.fo. Ímóti sumri kemur ein dagførd útgáva av Kveik, sigur Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, sum nú eigur dátugrunnin.

## Fakta

Kveik var eitt sjálvboðið átak, sum Janet Fríða Johannesen, Gunvør Balle og Bjørt Samuelsen tóku stig til. Átakið varð fíggjað av ymiskum stuðlum, har Tryggingarfelagið Føroyar hevur verið høvuðsstuðul. Á leið 350 kvinnur hava skrásett seg við førleikum og royndum á Kveik.fo, og hagtølini vísa, at tað javnan verður leitað í profilunum.